UTTAN ÚR HEIMI

# Krevja deyðarevsing fyri barnadráp

## Oljan dýrkar

Fyri fyrstu ferð í 15 mánaðir fór oljuprísurin upp um 30 dollarar fyri tunnuna týsdagin, og sambært serfrøðingum er tað ósemjan millum USA og Irak, sum hevur trýst prísin uppeftir.

Í New York fór olja, sum skal latast í september, fyri 30,32 dollarar fyri tunnuna, og meðalprísurin var 30,11 dollarar. Olja, sum skal latast í oktober, lá beint oman fyri 29 dollarar fyri tunnuna, men prísurin er fallin nakað síðani.

Marknaðarserfrøðingar siga, at fer oljuprísurin upp um 30 dollarar, kann tað lættliga órógva búskapin í teimum londum í vesturheiminum, sum nýta nógva olju.

## Nýggjan kirkjuleiðara

Leiðslan í katólsku kirkjuni í Avstralia er komin saman at velja nýggjan kirkjuleiðara, eftir at erkabiskupurin George Pell hevur lagt frá sær. Tað gjørdi hann, eftir at hann var vorðin skuldsettur kynsliga misnýtslu.

George Pell heldur uppá, at hann er ósekur, og hann hevur eisini boðið sæt til at hjálpa kirkjumyndugleikunum at greiða málið. Samstundis er komið fram, at maðurin, sum kom við skuldsetingini ímóti erkabiskupinum, hevur eina rættiliga kriminella fortíð.

George Pell hevur ikki verið serliga væl umtóktur, síðani hann gjørdist leiðari í katólsku kirkjuni í Avstralia í fjør. M. a. elvdi tað til nógv orðaskifti, tá hann segði, at fosturtøka er eitt størri brotsverk enn tað at misnýta børn og ung kynsliga.

## Umfarssótt ger um seg

Ein sera vandamikil umfarssótt hevur gjørt um seg á oynni Madagaskar teir báðar seinastu mánaðarnar, og sambært heilsumyndugleikunum hevur sóttin kravt 479 mannalív.

Læknarnir siga, at sóttin er ikki lívshættislig, um fólk fara nóg tíðliga til læknan, men trupulleikin er, at tað er langt ímillum læknamiðstøðirnar á Madagaskar. Harafturat er trot á starvsfólki í heilsuverkinum.

Ta fyrstu tíðina gjørdi umfarssóttin bara um seg har suðuri á oynni, men í seinastuni eru eisini fleiri fólk har norðuri vorðin sjúk. Ta seinastu vikuna eru átta fólk deyð í norðara partinum av oynni, sum er serliga illa fyri, hvat heilsurøkt viðvíkir.

## 1,2 mia. í lummapengum

Fahd kongur í Saudiarabia kemur neyvan í penganeyð, nú hann er farin til Spania at halda summarfrí. Við sær hevur hann 1,2 milliard krónur í lummapengum.

Tann 81 ára gamli kongurin kom mánadagin til Marbella, har hann skal halda summarfrí í frítíðarhúsunum Mar-Mar, sum er ein fullkomin eftirgerð av Hvítu Húsunum í Washington. Kongur eigur sjálvur húsini.

Sum rímiligt er, er kongurin ikki einsamallur, nú hann heldur summarfrí. Við í fylginum til Spania vóru meiri enn 500 starvsfólk og tænarar av ymsum slagi.

**Flestu bretar halda, at Ian Huntley og Maxine Carr eiga at fáa deyðarevsing, verða tey funnin sek í at hava myrt tær báðar tíggju ára gomlu Jessicu Chapman og Holly Wells**

SOHAM-MORÐINI
*Árni Joensen*

Týskvøldið boðaði bretska ákæruvaldið frá, at tað hevði formliga skuldsett tann 28 ára gamla Ian Huntley fyri at hava beint fyri teimum báðum gentunum, og tríggjar tímar seinni kunngjørdi ákæruvaldið, at 25 ára Maxine Carr eisini var skuldsett - ikki fyri morðini, men fyri at hava givið løgregluni skeiva frágreiðing.

Seinastu dagarnar hava tíðindi gingið um, at Ian Huntley er sálarliga sjúkur, og hann møguliga ikki kann ákærast og revsast fyri morðini, er hann sekur, men fremstu sálarfrøðingarnir í Bretlandi søgdu týskvøldið, at eftir teirra tykki er einki, sum bendir á, at Ian Huntley ikki kann ákærast og revsast, verður hann funnin sekur.

Í gjár var eisini ivi um, um løgreglan í Soham hevur nóg góð prógv ímóti tí 28 ára gamla skúlatænaranum. Rættarfundur skuldi ætlandi vera í gjár, men tað var kortini ivasamt, um hann kundi haldast, tí Ian Huntley lá tá á einum sálarsjúkrahúsi. Kundi løgreglan ikki sannføra rættin, kundi rætturin ikki gera annað enn at lata mannin leysan, men samstundis varð sagt, at verður hann latin leysur, er stórur vandi fyri, at fólk fara at taka lógina í egnar hendur.

### Krevja deyðarevsing

Fleiri av teimum stóru bretsku bløðunum hava seinastu dagarnar mælt til, at deyðarevsing verður sett aftur í gildi í Bretlandi í sambandi við barnamorðini í Soham.

Ein meiningakanning í Daily Mail vísti mánadagin, at 56 prosent av teimum spurdu tóku undir við, at fólk, sum myrða sakleys børn, eiga at fáa deyðarevsing. Sama kanning vísti, at flestu bretar halda, at fólk, sum misnýta børn kynsliga, fáa alt ov lítla revsing.

Einstakir politikarar siga seg eisini vera sinnaðar at seta deyðarevsingina aftur í gildi í sambandi við barnamorð. John Whittingdale og Nigel Evans úr konservativa flokkinum siga, at politikararnir eiga at taka spurningin upp í næstum.

Seinast bretska undirhúsið viðgjørdi eitt uppskot um at seta deyðarevsingina aftur í gildi var í 1994. Tá atkvøddu 159 fyri deyðarevsing, meðan 403 tinglimir atkvøddu ímóti. Ein teirra, sum atkvøddi fyri, var núverandi formaðurin í konservativa flokkinum, Iain Duncan Smith.



*Seinastu dagarnar hava nógv fólk og serliga børn lagt blómur nærhendis staðnum, har líkini av teimum báðum gentunum vórðu funnin*

# Deyðsliðini í Argentina verða nú avdúkað

**Amerikanska uttanríkisráðið almannakunngjørdi í gjár skjøl, sum prógva harðrendu framferðina hjá hernaðarstýrinum, sum ráddi í Argentina frá 1976 til 1983**

ARGENTINA
*Árni Joenen*

Tað var fyrrverandi amerikanski uttanríkisráðharrin, Madeleine Albright, sum undir einari vitjan í Argentina lovaði at útvega øll skjøl, sum kundu avdúka ta sera harðrentu framferðina, sum argentinska hernaðarstýrið nýtti ímóti politiskum andstøðufólki í árunum frá 1976 til 1983.

Í gjár helt uttanríkisráðið í Washington lyftið hennara og almannakunngjørdi 4.677 skjøl, sum snúgva seg um brot á mannarættindini í Argentina undir hernaðarstýrinum.

Ein serlig nevnd hjá amerikanska skjalasavninum hevur kannað skjølini, ið m. a. vísa, hvussu tað serliga deyðsliðið hjá hernaðarstýrinum, Deild 601, var skipað. Skjølini avdúka, at leiðslan í deyðsdeildini hevði beinleiðis samband við táverandi argentinska forsetan, Leopolde Galtieri.

Galtieri varð tikin fyri trimum mánaðum síðani og skuldsettur fyri brot á altjóða mannarættindini. M.a. er hann skuldsettur fyri at hava givið Deild 601 boð um at burturflyta andstøðufólk undir einum átaki, sum forsetin setti í verk í 1976. Tey næstu árini vórðu fleiri túsund argentinar settir í fongsul, píndir og síðani myrdir, meðan onnur hvurvu.

Amerikanska sendistovan í Argentina fór undir at skráseta framferðina hjá hernaðarstýrinum longu í 1977, og sagt verður, at í skjølunum verða meiri enn 10.000 brot á mannarættindini umrødd.

Millum teirra, sum hernaðarstýrið beindi fyri, vóru fakfelagsleiðarar, prestar, mannarættindafólk, vísindamenn, læknar og leiðarar í teimum politisku andstøðuflokkunum. Óheftir bólkar vilja vera við, at umleið 20.000 fólk vórðu fyribeind tey sjey árini, hernaðarstýrið sat við valdið.



# Tórbjørn Jacobsen neyvan 17. maður leingi aftrat

**Tórbjørn Jacobsen fer helst at biðja næstvaldu í Eysturoynni, Hallbjørg Hansen, taka sæti á tingi fyri seg, tá arbeiðið á fólkatingi verður uppafturtikið í oktober**

POLITIKKUR
*Jan Müller*

Hóast løgtingið ikki er saman í løtuni, og heldur ikki fólkatingið, so bendir alt á, at bæði hesi háttvirdu ting um ikki so langa tíð fara at hava úr at gera. Ein teirra, sum merkir hetta, er tingmaður og fólkatingsmaður Tjóðveldisfloksins, Tórbjørn Jacobsen. Fólkatingið er í summarfrí og kemur ikki saman aftur fyrr enn fyrst í oktober. Tá verða helst boð eftir føroysku fólkatingsumboðunum. Um somu tíð verða helst eisini boð eftir øllum tingfólkunum at arbeiða við fíggjarlógini og øðrum málum á tingi.

Eftir øllum at døma fer 17. maðurin hjá samgonguni ikki at verða Torbjørn Jacobsen til ta tíð. Sjálvur sigur hann við Sosialin, at tað fer vanligt, at føroysku fólkatingsmenninir, um nógv arbeiði er bæði á tingi og á fólkatingi, lata eykafólkini koma á ting. Hetta er eisini nakað, sum Tórbjørn Jacobsen umhugsar í løtuni. – Tá tað krevst, at eykamaðurin kemur inn, so verður tað gjørt sigur hann og vísir til, at tað verður so fyrrverandi borgarstjórin í Fuglafirði, Hallbjørg Hansen, sum tá kemur á ting fyri fyrstu ferð.

Uppá fyrispurning um tað ikki er eitt ynski frá leiðsluni í Tjóðveldisflokkinum eisini, at hann letur tingsessin til næstvalda í Eysturoynni fyri at skapa frið í samgonguni eftir tað nógva rumbuli í seinastuni sigur Tórbjørn Jacobsen, at tað verður bara hann sjálvur, sum fer at gera av, nær eykamaðurin kemur inn. – Tað er fult og heilt mín avgerð, um og tá tað hendir. Tingfólk eru jú suveren, so tað er teirra fulli rættur sjálvi at gera hetta av sigur hann.

Tingmaðurin, sum herfyri gjørdi ein ordans vørr í samgongunmi og var um at forkoma henni, ger púra greitt, at hann ætlar framhaldandi at brúka sín rætt til at luttaka í almenna orðaskiftinum í fjølmiðlunum og á tingi, soleingi hann hevur sæti har. Hann vísir avgjørdur aftur, letur hann tingsessin til næstvalda, at hetta tá er fyri at skapa ró aftur í samgongu. – Sum fólkatingsmaður fyri ein av samgonguflokkunum hevur tú sjálvandi eisini ein leiklut, men eg fari at so at siga mína meining, tá tað er neyðugt. Og okkurt kundi bent á, at tingmaðurin heldur hetta vera neyðugt longu nú tosað verður um at snikka eina nýggja fíggjarlóg til. Tórbjørn Jacobsen er annars eitt sindur í iva um, hvussu verður við fíggjarlógini. Hann ber ótta fyri, at ansa vit ikki eftir nú ikki at spenna bogan ov nógv, so verður galin endi og vit enda aftur í somu støðu sum í 80-unum. Tingmaðurin boðar frá, at hann ætlar sær í aftur bløðini í næstum: tá er evnið heldur einki minni enn fíggjarlógin. Sosialurin skilur annars, at tað kunnu koma nógvir brotasjógvar í sambandi við verandi fíggjarlógarviðgerð. Landsstýrisfólkini hava annars verið saman á Viðareiði fyri at leggja fyrstu lunnarnar undir fíggjarlógaruppskotið.





*Tórbjørn Jacobsen fer í næstum at gera av, um og nær næstvalda á tjóðveldislistanum í Eysturoynni, Hallbjørg Hansen, skal koma á ting fyri seg*

